Tilmælið hjá ICES drepur vinnuna

Tilmælið hjá ICES er órealistiskt. Verður tað fylgt, verður einki arbeiði á føroyskum fiskavirkjum yvirhøvur, sigur stjórin á Maru Seafood

FISKIVINNA
Edvard Joensen

– Tað ber ikki til hjá okkum at fylgja tilmælinum hjá ICES um at skerja fiskiskapin eftir toski og hýsu við tveimum triðingum og upsa við einum triðingi. Gera vit tað, verður einki arbeiði í Føroyum.

So einfalt setir Jóhan Páll Joensen, stjóri á Maru Seafood, roknistykkið upp, tá hann ger viðmerkingar til tilmælið frá ICES, sum kunngjørt varð í seinastu viku.

ICES tekur harðliga til í síni frágreiðing. Sagt verður um toskastovnin, at hann er í so stórari minking, at vandi er við verandi veiðitrýsti fyri, at hann kemur niður á støðið, sum hann var á í kreppuárunum fyrst í nítiárunum. Skal tað ikki enda soleiðis, má fiskiskapurin halda heilt uppat, um vit ætla at fáa stovnin upp aftur eftir einum ári. Yvir longri áramál kann tað gerast við at minka veiðitrýstið við tveimum triðingum, sigur frágreiðingin.

Tilmælið frá ICES er órealistisk, og fer, um tað verður fylgt, at gera, at einki arbeiði verður á føroyskum fiskavirkjum yvirhøvur, sigur Jóhan Páll Joensen, stjóri á Maru Seafood
Mynd: edvard Joensen

Hýsuni láta teir mestsum líka illa at. Hóast stovnurin er heilt væl fyri, er veiðitrýstið ov stórt og má minka við 17 prosentum, sigur ICES.

Upsastovnurin er eisni heilt væl fyri, men eisini her skal veiðitrýstið lækkast, skulu vit framhaldandi hava hendan góða stovnin. Her mælir ICES til eina lækking upp á 30 prosent.

Í niðurstøðuni av stovnsmetingini og ráðgevingini hjá ICES verður sagt soleiðis:

»ICES mælir tí til eina minking í beinleiðis royndini eftir toski og hýsu upp á umleið 2/3 í mun til ta verandi royndina. Royndin eftir upsa eigur at minkast við umleið 30%; um hjáveiðan av toski og hýsu veksur, eigur royndin eftir upsa at minka samsvarandi.«

Hetta er at leggja ov harðliga út, heldur Jóhan Páll Joensen. Hóast hann er samdur við fiskifrøðingunum í, at vit eiga at røkja stovnarnar skilagott, metir hann ikki hesa tilráðingina at vera realistisa.

– Vinnan ber tað heilt einfalt ikki. Minka vit veiðuna við tveimum triðingum, verður einki arbeiði í Føroyum yvirhøvur. So einfalt er tað, sigur hann.

Hann sigur, at hýsumarknaðurin í Bretlandi er undir sera hørðum trýsti í løtuni. Og tað er serliga heila hýsu, bretar vilja hava, vísir Jóhan Páll Joensen á.

Hýsumarknaðurin sum heild er Bretland og amerikanska eysturstrondin. Men nú dollarin er dottin niður í kjallaran, eru íslendingar, sum plagdu at selja til USA, eisini lagstir á Bretland, so har treingist í stórum. Hendir so tað, at vit skulu til at minka okkara veiðu so munandi, sum mælt verður til, og bretar vilja hava heilan fisk, er einki eftir til virkini hjá okkum at arbeiða, er dapra niðurstøðan hjá stjóranum á Maru Seafood.

– Men so galið verður tað ikki, tekur hann aftur í aftur. Tað ber ikki til, og vit fara eisini at síggja eina millumloysn millum tað, sum er í dag, og tað, sum tilmælt er, er hann sannførdur um.

Toskurin, sum fiskaður verður undir Føroyum, verður saltaður og seldur til Spania. Tann marknaðurin er lítil, og nógvir eru um boðið. Missa vit tveir triðingar av okkara parti har, koma aðrir beinanveg við sínum, og so verður ringt hjá okkum at koma afturíaftur. Tað er eisini eitt tungtvigandi argument fyri ikki at fylgja hesum tilmælinum, metir Jóhan Páll Joensen.

Hatta virkar eitt sindur komiskt

Tað virkar eitt sindur komiskt at tosa um skerjingar, samstundis sum sagt verður, at stovnarnir eru heilt væl fyri, sigur formaðurin í vinnunevndini hjá løgtinginum

Fiskivinna
Edvard Joensen

Báðir møguleikarnir, at fylgja tilmælinum frá ICES og heilt at síggja burtur frá tí, kunnu føra til undirgang, metir Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá løgtinginum.

—Sløkkja vit nú, eru vit vís í undirgangi. Taka vit kjansin, kann tað enda við undirgangi. Tí mæli eg til tað seinna, sigur hann.

Hann sigur, at hann veit ikki rættiliga, hvussu tað skal skiljast, at vit hava fiskastovnar, sum eru heilt væl fyri, tá vit ikki skulu brúka burtur av teimum.

Tað verður bara ein spurningur um, hvør skal sløkkja kontaktina, fiskifrøðingarnir ella vit, um tilmælini frá ICES skulu fylgjast, sigur Henrik Old, formaður í vinnunevnd løgtingsins

—Eg síggi onga meining í at hva ein stovn, sum er heilt væl fyri, bara til at goyma, sigur hann.

Men hann er varin við at siga nakað um, hvat hann politiskt fer at mæla til, tá málið skal viðgerast í vinnunevndini.

Enn verður bíðað eftir tilmælunum frá Fiskirannsóknarstovuni og fiskidaganevndini. Og so leingi einki er komið haðani, verður heldur eingin støða tikin, sigur Henrik Old.

Somu støðu hevur landsstýrismaðuin við fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø. Heldur ikki hann vil siga nakað, fyrr enn tey bæði tilmælini eru komin.

Tó sigur hann, at arbeit verður við at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, og at miðað verður eftir at hava eitt uppskot klárt til ólavsøkutingsetuna.

Henrik Old vísir á, at tiltøk eru alla tíðina, síðan lógin um vinnuliga fiskiskap kom í gildi í 1966, sett í verk fyri at minka um veiðitrýstið. Síðan byrjað varð, eru umleið 20 prosent av fiskidøgunum skarvaðir av, sigur hann.

Rox 2004:

Brakandi rokkur í badmintonhøllini

Komandi vikuskiftið verður stóra tónleikatiltakið Rox 2004 á fyrsta sinni hildið í Badmintonhøllini í Havn. 12 bólkar skulu spæla, og manningin á Margarinfabrikkini skipar fyri. – Ætlanin er at skipa fyri afturvendandi tiltøkum umframt at stovna ein grunn til tónleikarar, sigur Allan Mørkøre, ein av fyrireikarunum

TÓNLEIKUR
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Margarinfabrikkin er eftirhondini vorðin ein klekimaskina í føroyska tónleikaheiminum. Nógvir tónleikarar eru byrjaðir sína tónlistarligu ferð niðri í Magnus Heinasonargøtu í Havn, og nú taka teir fýra Bogi Andreasen, Karl Anton Klein, Tróndur Ravnsfjall og Allan Mørkøre stig til nýggj tiltøk við endamálinum at menna tónleikin og skapa umstøður fyri meiri avbjóðandi tónlistarligum virksemi.

Teir fýra Bogi Andreasen, Allan Mørkøre, Tróndur Ravnsfjall og Karl Anton Klein skipa næsta vikuskiftið fyri spildurnýggja rokktiltakinum Rox 2004, sum eftir ætlan verður afturvendandi. - Vit ynskja at geva tónleikarum møguleikan at spæla fyri størri áskoðarafjøld á størri tiltøkum og menna møguleikarnar og tónlistarliga umhvørvið, sigur Allan Mørkøre. Fyrsta tiltakið Rox 2004 er næsta leygarkvøld klokkan 22 í Badmintonhøllini
Mynd: Heini í Skorini

Rox 2004

Fyrsta tiltakið á skránni hjá teimum fýra er longu næsta vikuskiftið í Badmintonhøllini í Havn, tá 12 bólkar skulu folda seg út. Allan Mørkøre greiðir frá, at tiltakið byrjar klokkan 10, og leggur hann dent á, at tiltakið er fyri fólk í øllum aldri, og ikki bert fyri ungdóm, sum talan vanliga er um til konsertir í badmintonhøllini.

Nummar trý frá seinastu Prix Føroyar kapping, Makrel, er helst kendasta navnið, og onnur nøvn á konsertini, vit kenna frá Prix Føroyum, er m.a. Fluffy Toys, Headache Blues Trio og Side Effect. Annars hava fleiri av teimum 12 bólkunum á palli leygarkvøldið slitið síni fyrstu ljóðføri á Margarinfabrikkini.

– Hetta er so fyrsta tiltakið, og ætlan okkara í framtíðini er at skipa fyri tveimum konsertum um árið, sigur Allan Mørkøre, ein av teimum fýra fyrireikarunum. Allan sigur, at ongar ítøkiligar ætlanir eru gjørdar um tiltøk komandi tíðina, men hann leggur dent á, at ætlanin er eisini at skipa fyri konsertum aðrastaðni enn bert í høvuðsstaðnum.

Peningagrunnur

Sambært Allani fíggjar Margarinfabrikkin Rox 2004, og inntøkurnar til tiltakið fara eftir ætlan í ein grunn, sum skal nýtast aftur í næsta ár til konsertir.

– Á henda hátt ætla vit at fáa fíggjarligt grundarlag til framhaldandi virksemi, har peningurin fer aftur til tónleikararnar, sigur Allan. Sum sagt fíggjar Margarinfabrikkin fyrsta tiltakið, og tá fara útreiðslurnar til útgerð og leigu av Badmintonhøllini.

– Tónleikabólkarnir spæla ókeypis, og sostatt skuldi tiltakið malið runt fíggjarliga, og á henda hátt hava vit møguleikan aftur at skipa fyri nýggjum tiltøkum og konsertum næsta ár, sigur Allan Mørkøre.

Ein plakat verður í næstum at síggja, har boðað verður frá tiltakinum Rox 2004, og hesa plakat hevur Restorffs Bryggjarí stuðlað fyrireikarunum á Margarinfabrikkini við.

Manningin á Margarinfabrikkini hevur fingið stuðul til plakatina Rox 2004 frá Restorffs Bryggjarí
Mynd: Heini í Skorini

Menna tónleikin

Spurdur, hví stig verður tikið til hesar framtíðarætlanir, er Allan greiðir.

– Fleiri av tónleikabólkunum eru byrjaðir her niðri á Margarinfabrikkini, og fleiri eru enn virknir her niðri. Vit ynskja at geva teimum møguleikan at spæla fyri størri áskoðarafjøld á størri tiltøkum og menna møguleikarnar og tónlistarliga umhvørvið, sigur Allan Mørkøre.

So frá at hýsa tónleikabólkum og smærri tiltøkum niðri á Margarinfabrikkini roynir manningin nú nýggjar, størri og meiri avbjóðandi leiðir sum fyrireikarar, og fyrsta tiltakið er so á skránni komandi leygarkvøld, tá Rox 2004 á fyrsta sinni fer á flog, og skulu vit trúgva ætlanunum hjá Karl Antoni Klein, Boga Andreasen, Tróndi Ravnsfjall og Allani Mørkøre kunnu vit vænta okkum afturvendandi tiltøk í framtíðini við Margarinfabrikkini sum fyrireikara.

FAKTA

Tiltak:	Rox 2004
Fyrireikarar:	Margarinfabrikkin (Karl Anton Klein, Tróndur Ravnsfjall, Bogi Andreasen, Allan Mørkøre)
Tíð:	Leygarkvøldið kl 22
Stað:	Badmintonhøllin í Havn
Kostnaður:	120 krónur
Bólkar:	Fluffy Toys, Go-Go Blues, Speaker, 48 Pages, Makrel, Einkikanndiskuterastaltkann, The Story Ends, Side Effect, SIC, Zink, Paradox, Lamasea